

www.oljan.fo

**Jan Müller** 06 - 08 - 2013

# Norski oljugrunnurin eindømi í heimssøguni

Í føroyska kjakinum um hvussu vit skulu troyta møguligar komandi oljuinntøkur hevur oftani verið víst til norsku skipanina við einum almennum oljugrunni, sum hevur til endamál at goyma stóran part av inntøkunum til komandi ættarlið. Nú fær norska stjórnin og norska fólkið sum heild rós fyri oljugrunnin frá einum av heimsins mætastu fíggjarmonnunum, stjóranum í Goldman Sachs, Lloyd Blankfein. Hann hitti nú um dagarnar Jens Stoltenberg, forsætisráðharra. Blankfein heldur sambært DN, at heimsbúskapurin er væl betri fyri í dag enn fyri einum ári síðani. Men kortini ávarar hann um, at nógv kann ganga galið. Enn restar eitt stórt arbeiði í at minka um arbeiðsloysið og at fáa eftirlit at virka, sigur Blankfein til DN. Hann sigur samtíðis, at tað er heilt óvanligt og einastandandi, at Noreg megnar at halda seg frá freistingini at brúka allar oljupengarnar. Tað sigur nakað um politisku leiðsluna men eisini nakað um eginleikarnar hjá norska fólkinum. Tankin um at hetta ríkidømið skal vera ogn hjá fleiri ættarliðum er eindømi í heimssøguni, sigur Bleinfein.